# TILTØK

**Gudstænastur**
**2. Sunnudag eftir páskir**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Sverri Steinhólm
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Jóannis Fonsdal
***Argja kirkja:*** kl. 11, Bergur D. Joensen, Familjugudstænasta
***Kirkjubøur:*** kl. 12.30, Bergur D. Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Bláa Kross
***Vestmanna:*** kl. 11, Mogens Tilsted Christensen
***Miðvágur:*** kl. 11, David Johannesen
***Hósvík:*** kl. 11, Inga Poulsen Dam. ***Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju í Hósvík kl. 11.00***
***Glyvrar:*** kl. 11, konfirmatión, Meinhard Bjartalíð
***Eiði:*** kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 Messa, Emil Olsen
***Oyndarfjørður:*** kl. 12, Jógvan Fríðriksson
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
***Christianskirkjan:*** kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
***Viðareiðis kirkja:*** kl. 12, konfirmatión, Elsa Funding
***Skopun:*** kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
***Vágur:*** kl. 11, Patrick de Neergaard
***Hvalba:*** kl. 12.30, altarg., Jónsvein Bech

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgunin kl. 10.30, Breyðbróting, barnaansing verður eisini. Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánadagin kl. 19.30.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norasta Horni. Kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Leivur Nattestad.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti. Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøtir. www.frelsunarherurin.fo

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Umboð fyri Zarepta vitja á møtinum. Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**Fríkirkjan Oasan, Uppi á Brekku 3**
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ fam. við Skipá, kl. 14 Sunnudagsskúli. Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Mikumorgun kl. 7 Bøn. Verið øll hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 11 Bláikrossur hevur áhugatíma: »Hvussu møta vit rákinum í samfelagnum« v. Snorra Brend. Leygardagin kl. 16 Bláikrossur hevur pallborðsfund: »Livir rúsdekkalógin upp til sítt endamál«. Sunnudagin kl. 14 Familjumøti í Vesturkirkjuni, kl. 18 Blákrossmøti v/ Reimund Langgaard »Alt er loyvt, men ikki alt er gagnligt«.

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 9. apríl kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar. Annika Berg luttekur við vitnisburði.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit. Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit. Sunnudag kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni. kl. 14 Sunnudagsskúli. www.katolsk.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
David Beck talar á morgunmøtinum kl. 11.00 og á evangel. møtinum kl. 18.00 sunnudagin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn. Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Ólavur Guttesen, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin. Einki ABC vegna missiónskunning. Missiónsoffur verður tikið upp. Kl. 18 møti við Jan og Eydnu Joensen. Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla. kl. 18 evangel. møti við Magna Christiansen. Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti. www.gospel.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin verður einki møti í Hebron vegna legu á Zarepta. www.hebron.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, har evnið er »Eg eri ljós heimsins«. Kl. 11.30 samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 er evnið »Lívsandi Guds« á báðum møtunum talar Jógvan Z. Barnaansing undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12. Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti. www.livdin.fo

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ hósvíkingum og kl. 21 Ungdómsmøti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting kl. 11, Tummas Jacobsen úr Filadelfia í Havn talar. Verið hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna missiónsviku í Bø.

**Missiónsvika í Bø**
Leygardagin kl. 20 luttekur Toftakórið. Sunnudagin kl. 15 Familjumøti og kl. 18 Møti við Kajberg og Tominu, Streingjakórið syngur.

**Bønhúsið á Hellunum**
Sunnudagin kl. 16.00 Møti v/ John S. Myllhamar.

**Missiónshúsið í Oyndarfirði**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ John S. Myllhamar.

**Vikuskiftirmøtir í Avhaldshúsinum í Haldórsvík**
Leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnukvøldið kl. 18.00. Verið hjartaliga vælkomin til møtini.
*Hvítusunnusamkoman Saron.*

**Aglow, Eysturoy**
Vit samlast í Hæddini í Saltangará leygardagin kl. 15.00, talari Palli Højgaard. Allar kvinnur og menn hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake. Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj. Barnamøti kl. 17. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Regin Høgnesen og Dánjal Andreasen. Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 19.30.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti orsaka av ferming.

**Samkoman Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin er møti kl. 10.30 v/ Pola Jacobsen. Øll hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið í Søldarfirði**
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti – Ingibjørn Eldevig talar og sangkreftir heiman av Sandi luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður leygardagin kl. 20. Evnið verður »Evangeliskt« v/ Reimund Langgaard. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19 Møti v/ Øssur Kjølbro.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 21 Ungdómsmøti við Regin Høgnesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Eyðbjørn Jacobsen. Kl. 21 ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 19 Ungdómsmøti v/ Poul Hera Midjord. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti.

**Betania, Skopun**
Vikuskiftismøtir í Betania fríggja- og leygardagin kl. 19 – Kvøldmøtir. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Kvøldmøti, Andreas Jørgensen talar. Tit eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Hvalba.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Familjudagur, kl. 18 Evangel. møti. Eddie Bech talar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Onki møti sunnukvøldið vegna missiónsviku í Hvalba.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Leygarkvøldið verður møti kl. 20 v/ Niels Jacob Nielsen, trúboðara, Porkeris kórið syngur.

Leygarkvøldið kl. 22.30 Ungdómsmøti, ung úr Klaksvík luttaka. Sunnudagin verður ongin sunnudagsskúli vegna barnagudstænastu í kirkjuni har barnakórið syngur. Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Niels Jacob Nielsen. Kórið á Tvøroyri syngur.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Mikukvøldið 4. mai kl. 20.30 verður hugnakvøld við Marjun Bæk. Kristi Himmalsferðardag kl. 13.00 verður føroysk gudstænasta í Háteigskirkju, Marjun Bæk prædikar. Aftaná verður boðið til kaffi á Sjómansheiminum.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Innsavnan av barnamyndum o.ø. til ólavsøkuframsýningina.**
*Mánadagur 11. apríl:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobb og onnur spøl.
*Týsdagur 12. apríl:*
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Hvat er føroyskt handverk? Poulina Eliasen
*Mikudagur 13. apríl:*
kl. 10-16 Binding við perlum (á stokkum nr. 2), Katrin Samuelsen. Tilm. 316491
kl. 15 Túrur út í Sandágerð
*Hósdagur 14. apríl:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum. Bocciakappingin verður 17. apríl kl. 13.00 á Nabb
*Fríggjadagur 15. apríl:*
kl. 10-17 Hugnaløta við handarbeiði. Marita Thorsteinson

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

## BRÚDLEYP

Hósdagin – Kristi himmalsferðardag – tann 5. mai 2005 kl. 17.00 í Skopunar kirkju giftast Leila Cardinal Simonsen og Thomas Jacob Kjærbo, Skopun. Veitslan verður í bygdarhúsinum Samljóð í Skopun kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 505005 ella 361905 innan 25. apríl.

Fríggjadagin 6. mai giftast Olga Kristina Eysturstein og Sigmund Petur Skorastein, Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443110, 443046 ella 229145 í seinasta lagi 27. apríl.

## GULLBRÚDLEYP

24. apríl kunnu Herborg og Páll Joensen, Leirvík, halda gullbrúdleyp. Veitslan verður í Bygdarhúsinum 23. apríl kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá seinast 17. apríl á tlf. 443011, 443058 ella 443398.

## 60 ÁR

11. mai fyllur Ingeborg Vinther, Vágur, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í VB-húsinum´i Vági leygarkvøldið 21. mai kl. 19.00. Tey, ið vilja vera við til føðingardagshaldi, verða biðin um at siga frá á tlf. 373427, 312101 ella 212102 innan leygardagin 7. mai.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Stúrið tí ikki fyri degnum í morgin!«*
*(Matt. 6,34)*

Við til mannalívið hoyra stúran og ótti. Vit stúra fyri, um vit fáa nóg mikið av tí tímiliga, um vit fáa nóg nógvar pengar og ríkidømi til dagin og vegin og til lívsins uppihald. Og hetta er kanska natúrligt. Vit liva í einum heimi, har nógv skal til fyri at liva og yvirliva.

Og øll fáa ikki eins nógv, tá talan er um pengar. Hesin veruleiki skal ikki undirmetast.

Men hóast hetta, so sigur Jesus, at vit onga grund hava til at stúra og óttast. Eins og himmalski faðir okkara føðir fuglarnar og liljurnar á markini, soleiðis vil hann eisini føða og uppihalda skapningum sínum. Tí skal tú ikki stúra og óttast og falla í fátt. Tú hevur Gud við tær. Hann er ikki langt burtur frá nøkrum av okkum. At trúgva er at taka henda Gud uppá orðið. Hann lovaði okkum í dópsstund okkara, at hann fór at verða við okkum allar dagar alt til veraldar enda. Og hesi lyfti halda, eisini tá lívsins sjógvar bróta. Tak henda Gud við inn í lív títt, so verður lívið ríkt fyri tær og tú fært mál og mið í lívinum. Ikki so at skilja, at so gongur alt við í lívinum og so verða allar gátur loystar og allir spurningar svaraðir. Nei, als ikki. Men so at skilja, at tú fært samanhang í lívinum og fært megi og kraft frá Gudi til at tulka tað, sum hendur við tær og uttanum teg. Tú fært trúgv, sum kann flyta fjøll. Tú fært trúgv, sum kann liva við spurningunum og gátunum til Harrans dag. Hesa trúgv geva andin og orðið okkum í kristna felagsskapinum. Og henda trúgv rekur út stúran og ótta. Í hesi trúgv vilja vit liva og virka í heiminum til Harrans dag. Og við hesi trúgv sigra vit á trupulleikum og vansum inntil Guds ríki kemur í dýrd. At eiga hesa trúgv er at eiga Kristi sinnalag, sum er at vera undir Guds ávirkan og leiðslu. og tað er liva kærleikans lív í einum hørðum og køldum heimi. Men tað er soleiðis at verða salt og ljós í hesum heimi. Tað er at verða kærleikans umboð og amboð. Tað er henda haldgóða trúgv, sum rekur út stúran og ótta og sum gevur mál og mið fyri lívi okkara. Og málið er Guds ríki á himni.

Amen

**David Johannesen**